# Sosialurin VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 24. mars 2006



**Prison Break 1**

Spenningsrøðin, ið hevur verið sera væl móttikin í USA, Svøríki og Noreg, hevur nú frumsýning á Tv3. Ein ungur maður hevur framt eitt miseydnað bankarán og er endaður í geglinum eftir eitt stutt rættarmál. Men tað vísir seg skjótt at hesin frammanundan hevur gjøgnumhugsað eina neyva rýmingarætlan - og hann skal hava sín deyðsdømda bróðir við

**Sunnudag 26. kl. 19.00**

**O Brother, Where Art Thou?**

Leinkjaðir saman flýggja tríggir vinmenn úr fangilsi og undan myndugleikunum - vit eru í amerikonsku suðurstatunum í 1920unum. Á veg ímóti einum væl goymdum dýrgripi koma teir fram á alt frá vøkrum ungmoyggjum til skotvillum gangstarum. Skemtifilmur, ið Coen-brøðurnir hava staðið fyri - við George Clooney, John Turturo og Tim Blake Nelson í høvuðsleiklutunum.

**Mikudag 29. kl. 19.00**



**Simpsons**

Heilt óvæntað gongur tað ótrúliga væl hjá Homer, tá ið hann eitt kvøldið roynir seg á bowling-breytini. Hetta hevur við sær, at Homer av álvara gerst kendur millum fólk í lítla Springfield-býnum.

**Mikudag 29. kl. 22.45**


TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**